# KOMIN Á MÁL



**PRÓVTØKAN**

*Jógvan Martin Olsen kundi vera errin mikudagin, tá hann sum fyrsti føroyingur vardi høvuðsuppgávu sína sum UEFA Pro License-venjari. Frá vinstru: Ole Brandenburg, høvuðsinstruktørur, Jógvan Martin Olsen, Peter Rudbæk, instruktørur, og opponenturin, Niels Nielsen, ið er eitt slag av »danskari útgávu av Magna Mohr«*

*Mynd: DBU*



## *Jógvan Martin*

Jógvan Martin Olsen er 49 ára gamal. Í tilsamans 15 ár spældi hann við barndómsfelagnum, B68, har hann var við til at vinna FM í 1984, 1985 og 1992. Í 1993 var hann venjari hjá B68 í 2. deild, og í 1994 og 1995 spælandi venjari hjá LÍF, áðrenn hann seinnu hálvu av 1997 var venjari hjá B68 í 1. deild. Síðani vandi hann NSÍ frá 2002 til 2004, og fyrsta árið vann hann Løgmanssteypið og silvur í landskappingini, umframt at gerast ársins venjari. Síðani 2009 hevur hann verið venjari hjá Víkingi, har hann hevur vunnið Løgmanssteypið og bronsu í landskappingini. Mest kendur er hann frá landsliðsarbeiðinum, har hann fyrst frá 1996 til 2008 var við til at byggja upp konseptið við ungdómslandsliðum hjá Fótbóltssambandinum. Frá 1994 til 1998 var hann U17-landsliðsvenjari og frá 1997 til 2003 U19-landsliðsvenjari. Í 1996 var hann hjálparvenjari hjá A-landsliðnum, til hann í 2005 tók við sum A-landsliðsvenjari, ið hann var fram til 2008.

**SPÆLT VIÐ**

*Samstundis, sum Jógvan Martin Olsen hevur tikið UEFA Pro License-venjaraútbúgvingina, hevur hann røkt starvið sum venjari hjá Víkingi, har serliga spælararnir hava verið partur av tilgongdini*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

## Um UEFA Pro License

UEFA Pro License er hægsta altjóða venjaraútbúgving innan fótbólt, ið kann takast. Fyri at kunna taka hana, krevst millum annað, at ein venjari fyrst hevur bæði A- og B-prógv. Í mun til A- og B-útbúgvingarnar, ið snúgva seg meira ítøkiliga um sjálvan fótbóltin, fevnir Pro License-útbúgvingin eisini um alt annað, ið er rundan um sjálvt fótbóltsspælið.

Millum annað leggur danska fótbóltssambandið, DBU, stóran dent á, at venjarar við Pro License-útbúgvingini skulu vera førir fyri at leiða liðið, at leiða liðið rundan um liðið, umframt at »lesa spælið uttan fyri vøllin,« so sum at nevnd, fjølmiðlar, fjepparar og so framvegis. Men fyrst og fremst er tó sjálvur fótbólturin í fokus.

Talan er um eina bæði teoretiska og praktiska útbúgving, ið fevnir um tilsamans 240 tímar, harav 90 tímar fevna um praktiska partin. Útbúgvingin verður tikin í modulum, fevnir um skrivligar uppgávur og námsferðir, umframt at skrivast skal ein høvuðsuppgáva, ið bæði skal góðkennast og verjast, áðrenn prógv verður latið.

Í flestu europeisku londum verður kravt av venjarum í bestu deildini, at teir hava UEFA Pro License-útbúgvingina, so talan er tí eisini um eina útbúgving, ið kann geva atgongd til sjálvt hægstu venjarasessir í Europa.

ófatiliga nógv, og hetta kundi eg ongantíð lært í Føroyum. Eisini hevur útbúgvingartilgongdin givið mær eitt stórt og týdningarmikið netverk, ið eg heldur ikki hevði fingið, var eg ikki farin undir útbúgvingina, sigur hann.

Við sínum nýggju pappírum í hondini hevur Jógvan Martin Olsen eisini heilt aðrar møguleikar, enn hann hevði frammanundan, tí eitt UEFA Pro License-venjaraprógv kann vera nógv vert, skuldi ein fyrispurningur komið um okkurt venjarastarv uttan fyri føroysku landoddarnar.

– Tá eg var farin frá sum landsliðsvenjari, var onkur útlendskur fyrispurningur, men so kom Víkingur inn í myndina, og tað gjørdist ikki aktuelt. Men hevði onkur fyrispurningur komið í dag, hevði eg helst verið meira áhugaður, tí nú veit eg, at eg havi neyðugu førleikarnar. Og tað vildi sjálvandi verið spennandi at sloppið at roynt seg sjálvan í einum øðrvísi umhvørvi, sigur Jógvan Martin, sum í øllum førum sleppur út at ferðast onkra ferð aftrat í sambandi við útbúgvingina.

– Skal eg varðveita prógvið, er eitt krav, at eg haldi meg dagførdan við í minsta lagi tveimum skeiðum næstu trý árini, og tey skeiðini eru so ikki í Føroyum. Hinvegin eri eg ikki minst spentur, at sleppa at geva frá mær tað, eg havi lært, so tað kann gagna føroyskum fótbólti og kanska skunda undir, at aðrir venjarar fara sama veg.

*hilmarjan@sosialurin.fo*